ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Hjálpið mær at minnast, hvør eg eri. Eg minnist einki sjálvur*
*amerikanarin »Al«*

# 800 milliónir svølta – ein milliard eru ov feit



*Ovurfiti kann elva til varandi sjúkur so sum hjartasjúkur og sukursjúku.*

**Sambært heimsheilsustovninum eru tað fleiri, sum líða av fiti enn hungri.**

Av teimum seks milliardunum, sum búgva á Jørðini, hava umleið 800 milliónir fólk ov lítið til matna. Men samstundis eru tað umleið ein milliard fólk, sum eru ov væl í holdum, og av teimum líða umleið 300 milliónir av ovurfiti, skrivar AFP.

Tølini eru frá heimsheilsustovninum WHO, sum sigur trupulleikarnar við fiti vera eina heimsumfatandi sótt, sjálvt um hesin trupulleikin er størri í summum pørtum av heiminum enn øðrum.

Í Danmark verður mett, at umleið 10 prosent av fólkinum líða av ovurfiti, og í Noregi vísa tey seinastu tølini, at har hava umleið níggju prosent sama trupulleikan. Gongdin har er eisini týðilig. Í dag vigar ein 40 ára gamal norðmaður í meðal fimm kilo meiri, enn ein 40 ára gamal vigaði í 1985.

Men ringast stendur til í USA, har heili 30 prosent av tí vaksna fólkinum líða av ovurfiti. Tað svarar til 60 milliónir fólk. Í Evropa eru tað serliga bretar, sum hava sama trupulleika. Har líða 23 prosent av ovurfiti. Í Týsklandi er talið 12 prosent og í Italia átta. Talið veksur støðugt. Av teimum 60 milliónum fransmonnunum hava næstan seks milliónir trupulleikar við ovurfiti. Fyri tíggju árum síðani var talið helvtina minni.

### Eisini børn

Alt fleiri og fleiri børn fáa eisini trupulleikar við fiti. Í ES verður hildið, at 14 milliónir børn har eru ov feit, og av teimum líða tríggjar milliónir av ovurfiti. Í Portugal hava 30 prosent av børnunum trupulleikar við fiti, og í USA er talið á børnum við hesum trupulleika trífaldað síðani 1980.

WHO vísir á, at fiti kann elva til varandi líðingar, og at í nógvum førum endar tað við hjartasjúkum, sukursjúku og ávísum krabbameinssjúkum. Eitt nú kann WHO vísa á, at 90 prosent av teimum, sum hava fingið staðfest diabetis 2, viga ov nógv.

# Veit ikki hvør hann er

**Løgreglan kallar hann »Al«, tí maðurin veit ikki, hvør hann er.**

Tann 10. september vaknaði Al á einari gongubreyt í amerikanska býnum Denver. Hann veit ikki, hví hann lá har. Hann veit heldur ikki, hvør hann er, skrivar blaðið Denver Post.

Í einari roynd at finna seg sjálvan hevur hann nú biðið almenningin um hjálp.

– Eg vil sleppa aftur til fortíðina. Eg vil hava at vita, hvør eg eri, sigur Al við blaðið.

Løgreglan í Denver sigur, at Al minnist ikki, hvussu hann plagdi at gera sær mat, og hann dugir heldur ikki at minnast, um hann nakrantíð hevur koyrt bil. Læknar4nir, sum kannaðu hann, funnu einki tekin um alkohol ella annað rúsandi evni í kroppi hansara, og teir funnu heldur einki tekin um, at hann hevur fingið skaða í høvdið.

Umframt klæðini, sum hann var í, hevði Al ein ring og ur, men hóast drúgvar kanningar hevur tað ikki eydnast løgregluni at finna útrav, hvar hann kann hava keypt ringin og urið. Løgreglan hevur eisini kannað hansara fingramerki, men heldur ikki tey kunnu loysa gátuna.

Summi halda, at hann man hava verið listamaður, tí tað hevur víst seg, at hann dugir væl at tekna. Onnur halda, at hann misti minnið, tá kona hansara og børnini doyðui í einari ferðsluvanlukku. Men hvørjari ferðsluvanlukku, nær og hvar?

Løgreglan í Denver viðgongur, at hon stendur á berum. Hon er vís í, at Al spælir ikki sjónleik, tí tað hava sálarfrøðingar staðfest.

## STUTT SAGT

### Svøltar seg

Hvítarussiski andstøðuleiðarin Aleksandr Kozulin er farin í hungursverkfall í fongslinum, sum hann er í, eftir at hann fekk hálvt sætta ára fongsul fyri at hava eggjað til mótstøðu ímóti stjórnini. Kozulin var forsetavalevni hjá andstøðuni seinast, men tapti ímóti Aleksandr Lukasjenko, forseta, hóast altjóða eygleiðarar vóru á einum máli um, at valið var ikki rættvíst. Við at svølta seg vónar Kozulin, at umheimurin fær størri ans fyri viðurskiftunum í Hvítarusslandi.

### Høvdu tannlæknar

Egyptiskir fornfrøðingar eru komnir eftir, at teir gomlu egyptararnir løgdu nógv størri dent á tannrøkt enn higartil hildið. Í einum útgrevstri nakað sunnan fyri Kairo hava fornfrøðingarnir funnið tríggjar gravstaðir hjá tannlæknum. Fornfrøðingarnir halda, at teir tríggir hava havt til uppgávu at ansa eftir tonnunum hjá kongshúsinum. Sambært fornfrøðingunum er hetta ikki tað seinasta, sum kemur undan kavi í Egyptalandi. Teir halda, at enn er bara ein triðingur av øllum teimum gomlu gravunum har funnar.

### Heppin ferðamaður

Amerikanarin Bob Wehle var ovurfegin, tá hann fyri nøkrum døgum síðani var og vitjaði eitt friðað øki í Murfreesboro. Tað sermerkta við hesum økinum er, at har kunnu ferðafólk leita eftir diamantum, og finna tey nakran, kunnu tey taka fongin við sær til hús. Bob Wehle var so heppin at finna ein diamant, sum var 5,47 karat, og sum var í góðum standi. Tey serkønu siga, at hann kann fáa upp í einar 380.000 krónur fyri diamantin.